# tankar um lívið

*Kim Simonsen skrivar*

## Keðsemi og lívsleiði

Mótpólar til eydnuna eru eisini kenslur, ið finnast í dagdegnum. Lívskenslur so sum lívsmót og gleði kunnu minka, syndrast og upployst. Ótti, keðsemi og vónloysi eru dømi um minkandi lívsmátt. Januarmánaði kann vera fullur av rokningum, kulda, vónloysi og moralskum timburmonnum, ið mangan stava av ovuráti, drukk ella ovurnýtslu. Um vit hava møtt stórari mótgongd, vónbroti, smeitum og illroyndum, kunnu vit koma fram á lívskenslu, ið er merkt av tungum harmi, dapurleika, sorg, vónloysi og gremjan. Kenslan er soleiðis hættað, at einum bert rennur í hug, at heimurin er oyðin, tómur og myrkur. Somuleiðis kunnu vit kenna okkum sperd av at noyðast at taka okkum av onkrum, ið vit ikki hava hug til, ella okkurt, ið heldur okkum frá at gera tað okkum innast inni lystir. Serliga tá er tað, at keðsemi heldur seg framat, sum mangan ófrættkendan og óbodnan gest.

Heimspekingar sum Kierkegaard, og í nýggjari tíð Doehlemann, eru kendir fyri góðar royndir at greina keðsemi. Tað er t.d. munur á keðsemi, ið bert finst eina løtu, t.d. tá tað er neyðugt at bíða eftir bussinum, og eini varandi kenslu av keðsemi, ið ávirkar alt lív og alla lívsførsu. Somuleiðis er tað ein munur á kensluni av, at januar er tungur at liva seg ígjøgnum, og at halda, at lívið sjálvt er torført og dapurt. Kenna vit bert keðsemi, kunnu vit tosa um eina álvarsliga minking av lívsfýsni okkara. Sum oftast eru slíkar støður tengdar at ávísari lagnu, og broytist henda lagna, so broytist støðan eisini, og tá kann lívsmótið og lívsgleðin venda aftur.

Tey, ið liva við kensluni av lívsleiði, har tilveran er endað í einkileika, oydnari og óhjálpnari tómleikakenslu, uppliva tað, ið Dohlemann rópar, óberandi keðsemi. Tað er henda støða, ið modernaða eksistentialistiska lívsheimspekin (serl. Sartre) rópar eksistentielt keðsemi. Í miðøld róptu menn hetta lívsleiði, ið umfataði fyrst og fremst acedia (dølskni), tristia (’tristheit’ ella dapurskygni) og taedium (keðsemi). Lívsleiði var mett sum ein álvarslig last og deyðssynd, ið ein átti at køva. Í dag vita vit, at slíkar kenslur kunnu vera sjúkueykenni, at tungslyndi kann verða tekin um depressión, troyttleika og darvandi melankoli, ið langt frá eru lastir, men kunnu enda við at geva einum persóni eina ringa lagnu. Somuleiðis er neyðugt at gera vart við, at tað finnast nógvar depressivar melankolskar sinnisstøður og reint eksistentielt keðsemi, ið ikki eru sjúkueykenni. Vit gerast mangan hvíldarleys og órólig, og nógvar møguligar frágreiðingar finnast til hetta. Hin naturalistiska kósin hevði lagt á at greiða frá hesum út frá tí, at vantar menniskja sansaávirkan, legst keðsemi á okkum. Gerst alt ov monotont, so detta vit niður í kensluloysi, dølskni og til endans reint apati. Okkum vantar okkurt nýtt, spennandi, stuttligt, broytingar og endurnýggjan.

Heimspekingurin Pascal helt, at menniskja bert ferðast ímillum keðsemi, apati og friðloysi. Voltaire letur Candide siga, at menniskja bert er føtt at liva í ævigari órógv ella í tyngdarkendari sovisjúku, eins og Sopenhauer, ið helt, at vit ferðast ímillum líðingarkenda misnøktan og fulna, sum bert endar sum ein plága og reint keðsemi. Tá vaksin fólk møta keðseminum minna kenslurnar mangan um tær hjá børnunum, men vit hava vanliga eitt val — vit kunnu velja okkurt annað. Milan Kundera skrivar um hetta í bókini:”La lenteur” (Seinføri), at samfelagið er broytt, soleiðis at menniskja m.a. hevur átikið sær ferðina hjá maskinunum, t.d. tá vit koyra bil njóta vit ikki at koyra spakuliga. Vit tosa t.d. helst ikki saman í bilunum og er onkur frammanfyri, ið koyrir alt ov spakuligt, so illneitast vit inn á hetta. Hjá Sartre finna vit kendastu orðingarnar um keðsemi og lívsleiði. Tilveran hevur ikki eina ávísa meining, vit eru noydd at áseta hana sjálvi. Frælsi skapar ótta, fremmandagerð og sjálv tilveran elvur til vaml. Vit eru ikki til sum eitt nú ting, men á lívi í einum irrationellum og absurdum heimi. Soleiðis er grundarlagið undir tonkunum hjá Satre og Camus kenslan av iva og negativi kensludrátturin, vit noyðast at velja og skapa framtíðina. Vit kunnu tí vinna lívinum frama, og køva lívsleiði og keðsemi, um vit finna fram til at liva veruliga og at liva í trúskapi, við sjálvsræði, eru avgjørd og liva við virkisorku. Neyðugt er tó at átaka okkum fulla ábyrgd av egnum lívi.

## Málbitin

### Hvussu eitur pávin?

Rætt ger sjónvarpið at kalla pávan Jóannes Páll. Jóannes Pauli er óhóskandi. Pauli er komið av latínskum hvørsfalli av Paulus. Í donskum álmanøkkum stóð við pálsmessudag 25. jan. “Pauli omvendelse”. Hetta navn hóskaði væl í føroyskari bending og er nú vanligt navn, ið má sigast at hava vunnið hevd. Men sum seinna navn pávans hevur tað ikki sørt løgnan dám.

### Terna

Tað frættist, at flogternur vóru farnar í verkfall. Sum ikki einaferð varð orðið skeivt framborið, -rn- sagt [dn]! Tað eru tvey ymisk orð, sum hava sama snið í skrift, men ljóða ólík í framburði. Tað, sum er seinni liður í nýggjyrðinum flogterna, er gamalt orð, ið merkir ‘tænastugenta’. Í tí orðinum verður -rn- sagt sum [rn: terna]. Hitt orðið er navnið á hinum vælkenda fuglinum, og í tí ljóðar -rn- sum [dn] (í Suðuroy sum [nn: tenna]). Tíðindamenn í útvarpi og sjónvarpi eiga at gera mun á hesum báðum.

### Lýsingarorð í hástigi skulu verða bend

Tann ósiður er tíverri vanligur at hava lýsingarorð í hástigi óbend, t.e. við ongum endingum. Her man verða hermt eftir donskum, sum eins og kunnugt ongar endingar hevur í sterkt bendum lýsingarorðum. Sum dømi kann verða nevnt hetta, ið var at hoyra millum útvarpstíðindi herfyri: “Hann hevur “størst” møguleikar at gerast forsætisráðharri.” Her er ikki um at tala annað enn at siga størstar møguleikar, hvønnfall í fleirtali. Hetta er heldur ikki ókent í skrift. Her er at vera ansin, tí sovorðið smittar sum pestin.

*Úr Orðafari nr. 3, 1987*

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Lena Ziskason, Dubai, erland.jensen@tku.ericsson.se
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Hvat oljupengar eisini kunnu brúkast til !

Í hesum døgum verður nógv tosað um eina komandi oljuvinnu í Føroyum. Eisini hevur man hoyrt fleiri tosað um, at føroyingar tá blíva eitt tað ríkasta fólkið í heiminum. Eftirsum eg búgvi í Dubai, sum er næst størsti býur í Sameindu Arabisku Emiratunum, har tey hava livað av oljuvinnu tey seinastu 30 árini, fari eg skriva eitt sindur um, hvat tey hava valt at brúka oljuinntøkurnar til.

Tá vit fyri skjótt tveimum árum síðani fingu tilboð um at flyta til Dubai, visti eg ikki, hvat Dubai var fyri ein býur. Eg fór í gongd við at finna bøkur um Dubai og sat eisini og las nógv á internetinum um Dubai og um tey Sameindu Arabisku Emiratini, sum Dubai er eitt av. Beinanvegin fann eg útav, at Emiratini eru eitt sera ríkt land og Abu Dhabi, sum er høvuðsstaðurin, er ein av heimsins ríkastu býum og at næstan allar inntøkur koma frá oljuvinnuni.

So skjótt man kemur til Dubai, sást, at hetta er ein ríkur býur. Tað eru nógv stór og høg hús at síggja og tey eru ikki bara fýrkantaði, men rund, oval ella okkurt heilt annað. Og tey eru øll nýggj. Eg trúgvi ikki tað er nakað høghús í býnum, sum er eldri enn 20 ár. So skjótt tey blíva eitt sindur gomul og tað er meiri enn 10 ár herniðri, so verða tey brotin niður og eitt nýtt bygd.

Eitt tað størsta tey hava bygd her nýliga er Burj Al Arab, sum er verðsins fyrsta og einasta 7 stjørna hotel. Tað er bygd úti á einari kunstigari oyggj, har brúgv er gjørd út til. Tað er bygt sum eitt segl og alt inni í hotellinum symboliserar okkurt frá sjónum. Har er millum annað ein fiskaresturatión, sum er undir vatni. Fyri at koma niður til hesa resturatión kann man velja at fara í ein elevator, sum fyristillar ein undirvatnsbát!

Søgurnar herniðri siga, at tað er Sheikh Mohammed bin Rashid al Maktoum, sum er krónprinsur í Dubai, sum hevur bygd hetta hotel, fyri at Dubai kann hava eina attraktión til turistarnar. Og tað má sigast, at tað hevur eydnast honum, tí hvønn dag sær man eina rúgvu av fólki standa og taka myndir av tí.

Tað seinasta nýggja tey eru byrjað uppá er at byggja tvær kunstigar hálvoyggjar. Hesar oyggjar skulu vera sum pálmar at síggja, har stamman á trænum er ein trísporaður motorvegur og síðan skulu tað vera 17 pálmubløð á hvørjari stammu. Úti á hvørjum blaði skulu vera fleiri hotellir og luksushús og luksus íbúðir, sum privat fólk kunnu keypa. Prísurin á húsunum er ikki heilt fastlagdur enn, men tey byrja frá 500.000 USD ella umleið 4,5 mill. kr. Øll húsini hava antin egna strond ella egið bátapláss. Tað skulu verða eini 3000 hús og íbúðir tilsamans á báðum oyggjunum umframt fleiri shoppingcentur o.a.. Eisini er ætlanin at gera eina stóra vatnpark, har man kann fara inn at síggja hávar, delfinir og nógv onnur djór, sum liva her um leiðir. Oyggjarnar skulu røkka umleið 5 km út í Golfin og kostnaðurin verður umleið 1,5 bill. USD ella umleið 13 milliardir kr. og tá er kostnaðurin fyri hotellini, hús og íbúðir ikki íroknaður.

Av tí, at man hevur valt at byggja hesar oyggjar eitt sindur uttanfyri Dubai, um 25 km frá centrum, krevst, at vegir og annað eisini verður gjørt. Í dag eru ongi tok í Emiratunum, men tað skulu tey eisini til at byggja, so tað verður lætt og skjótt at koma til og frá hesum oyggjum. Eisini skulu nógvir turistar til, fyri at tey næstan 80 hotellini skulu klára seg. Tí hevur tað lokala flogfelagið, Emirates Airline, í oktober mánað í fjør umbiðið 58 nýggj flogfør, so teir kunnu flúgva allar turistarnar til og frá Emiratunum og ætlanin er eisini at byggja ein nýggjan flogvøll. So tað er nógv sum skal hanga saman fyri, at hetta alt skal bera til. Men herniðri eru tey ógvuliga optimistisk. Eftir ætlanini skal alt vera liðugt til ár 2010, bæði flogfør, vegir, toksamband og øll hotellini. Eisini vænta tey tá at hava selt 3000 hús og íbúðir.

Hetta er nokk ikki nakað føroyingar fara í gongd við um nú oljuinntøkurnar vísa seg at blíva so høgar. Tað er eitt sindur lættari at lokka turistar at koma til slíkt, tá tað eru millum 25 og 45 hitastig alt árið.

ítróttur

Nr. 8 • leygardagur • 12. januar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Vágamenn seta beina kós



*Bjarni Prior, sum her sæst í dysti fyri B36 móti júst FS Vágum, er bert ein fleiri leikarum, sum FS Vágar nú hava styrkt sær um leikarahópin við*

**Hóast teir í fjør fluttu eina deild niður, so eru ætlaninar við fótbóltinum á ongan hátt minkaðar í Vágoynni. Við einum styrktum liði setir felagið nú beina kós uppeftir, so liðið er í fyrstu deild, tá undirsjóvartunnilin er veruleiki**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Orðini vóru stór, tá vágamenn eftir seinasta dystin í fjør ásannaðu, at teirra kós nú gekk beint niður í aðru deild. Uttan stórvegis himpr varð sagt, at hetta ikki var nakað endaligt farvæl, men at felagið tvørtur ímóti satsaði heilt nógv upp á eina skjóta afturvendan til ovastu røðina.

### Nógv á skránni

At døma eftir aktivitetinum í Vágoynni í vetur, so er heldur ikki nakað, sum bendir á, at felagið á nakran sum helst hátt hevur mist mótið.

Heldur ber til at venda støðuni á høvdinum og siga, at niðurflytingin hevur veirð beinleiðis sunn fyri felagið. Heldur enn at stríðast fyri tilveruni í bestu deildini, og heldur enn alla tíðina at hugsa um stuttskygdar lappaloysnir, eru eyguni nú vend fram í tíðina við teirri optimismum, sum har til hoyrir.

Gaman í hevur felagið mist kanska evnaríkasta leikaran við tað, at Tór-Ingar Akselsen hevur valt at fara til HB í ár, men so tykist eisini vera liðugt við frágongdini.

### Brasiliumaður og Prior

Felagið hevur longu gjørt avtalu við sterka málverjan, Arturas Ramoska, um, at hann skal halda fram í felagnum, og hóast hvørki Vlad Osipov ella Ruslan Screlea hava fingið longdan sáttmála, so tykist tað vera vist, at eisini teir verða í Vágoynni komandi kappingarár.

Harafturat hevur felagið longu fingið tilgongd av Jens Erik Rasmussen, sum verður leikandi hjálparvenjari, og hesin er ikki einsamallur, nú hann kemur heim úr íslendska Leiftur.

Tá Páll Guðlaugsson í sínari tíð fekk fatur á nøkrum brasiliumonnum til B68, varð hetta gjørt í sambandi við, at fyrrverandi landsliðsvenjari okkara var í Brasilia, har hann skuldi leita eftir leikarum til Leiftur.

Ein av hesum, Alexandre da Silva Braga, hevur nú í tvey ár verið liðfelagi við Jens Erik, og hóast tað enn ikki er endaliga avgreitt, so skilst á øllum brøgdum, at vágamenn rokna við, at hesin kemur til landið í februar mánaði. Samband hevur eisini verið við ein annan brasilskan leikara, men sum skilst er tað í løtuni sera ivasamt, um hesin styrkurin verður av nøkrum.

Har afturat hevur felagið fingið tilgongd av einum gomlum kenningi, við tað at Bjarni Prior hevur valt at skifta FM-tilveruna í B36 út við eina tilveru hjá barndómsfelagnum, tó at hetta er í aðru deild.

Spurdur um orsøkirnar til hetta, sigur Bjarni, skemtandi, at nú hevur hann jú roynt at verið føroyameistari, so nú hevur hann nátt tað, sum hann setti sær fyri, tá hann í 1998 skifti til B36.

Heldur meira álvarsamur leggur hann afturat.

- Tað tykist fyri mær, sum um tað nú er betri skil á fótbóltsviðurskiftunum í Vágunum, enn tað hevur verið. Tað líkist jú ongum, at oyggin ikki hveur staðið seg í fyrstu deild, men sum tað nú sær út, so tykist tað heilt spennandi. Ikki minst við atliti til, at undirsjóvartunnilin verður veruleiki til 2003, og tá er neyðugt, at felagið hevur lið í bestu deildini, heldur hann, og leggur afturat, at tað er í sátt og semju, at hann nú fer úr B36.

- Sjálvandi havi eg kanska sitið í meira lagi á beinkinum í B36, og rokni eg við, at spælitíðin verður meira í Vágunum, men hinvegin skerst ikki burtur, at eg havi verið ótrúliga fegin um tíðina, sum eg havi verið í B36.

- Her havi eg fingið mínar higartil størstu fótbóltsupplivingar, og ikki minst komið eg at sakna leikararnar og áskoðararnar, sum hava verið ein partur av hesum. Her havi eg eisini sæð, hvussu nógv eitt gott samanhald á liðnum hevur at siga, og fái eg ført nakað av hesum víðari til FS Vágar, so er nógv vunnið sigur Bjarni at enda.

### Endurkomur & útisetar

Av omanfyristandandi framgongur helst, at liðið hevur í øllum førum somu styrki í ár, sum teir høvdu í fjør, men vágamenn hava enn fleiri trumfar í hondini.

Tað ljóðar, at Ari Thomassen, sum í fjør ikki segði seg hava stundir til fótbóltin, aftur hevur funnið skógvarnar fram, og harafturat er John Johansen, sum í fjør misti alt árið við brotnum beini, aftur tøkur, so meira enn nakað annað tykist liðið vera styrkt.

Og at enda, so skal ikki gloymast, at við einum lidnum undirsjóvartunnli í 2003 verður tað munandi lættari hjá felagnum at halda leikarar í felagnum. Eisini um hesir fara til eitt nú Havnar at útbúgva seg.

Tað er jú eingin loyna, at Vágoyggin í fleiri ár hevur átt nakrar av frægastu leikarunum í landinum, men tíverri fyri vágamenn, so hava hesir traðkað skógvarnar í øðrum feløgum.

Eitt nú eru teir tríggir, Jóhannes Færø, Jóhannis Joensen og Tór-Ingar Akselsen, nú allir í HB, meðan Birgir Jørgensen skjýtur síni mongu mál fyri VB. Tað er sjálvandi ikki vist, at allir hesa venda »heim« aftur, men við einum sterkum vágaliði og føstum sambandi um vestmannasund er als ikki óhugsandi, at frá 2003 at rokna verður Vágoyggin í nógv størri mun ein faktor, sum roknast skal við í føroyskum fótbóltshøpi.